## Solskjær gevst

Hann varð alt fyri eitt róptur fyri the bay-faced assassin, tá hann kom til Manchester United í 1996. Við mest sum barnsliga andlitsbráðnum var Ole Gunnar Solskjær í fleiri ár ein av vandamestu áleyparunum í enskum fótbólti, og 126 mál í 366 dystum fyri Manchester United tosa sítt týðiliga mál um hetta. Ikki minst, tá hugsað verður um, at Solskjær byrjaði nógvar av hesum dystunum á beinkinum. Hæddarpunktið var uttan iva 2-1 málið í Champions League finaluni á Camp Nou móti Bayern München, men á sín hátt var hetta eisini byrjanin til endan. Knæið fekk nevnliga ein løst í fagnaðarløtunum eftir málið, og síðani hava knæskaðar av ymsum slag argað nroska málrevin. Somikið illa, at hann nú hevur tikið avgerð um at gevast.



## Royna spælarar úr Senegal

B68 og KÍ hava seinastu tíðina havt nýggjar spælarar við í venjingum sínum. Talan er um fýra spælarar úr Senegal, sum í hesum døgum eru í Føroyum. Tveir teirra hava vant við KÍ og hinir báðir hava vant á Toftum. Flytingarvindeygað fyri spælaraskifti er tó latið aftur á føroyska marknaðinum, og tí verður tað í fyrsta lagi til komandi kappingarár, at føroyskur fótbóltur fær gleði av spælarum úr Senegal. Hetta sjálvandi um venjingarnar hjá onkrum av spælarunum geva úrslit í einum sáttmála.

# Seinasta útkall

**Umframt Litava er talan restina av 2007 um dystir móti trimum av atta sterkastu londunum í heiminum. So skal eitt stig koma, er søguligi 12. september helst besti møguleikin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Teir komu báðir á vøllin sum innskiftarar, tá Føroyar í oktober mánaði 2002 taptu 2-0 fyri Litava í Kaunas. Andrew av Fløtum stóð seg somikið væl ta ferðina, at hann vann sær pláss í byrjunaruppstillingini til dystin móti Týsklandi fýra dagar seinni, og sum ikki eina ferð sýndi Rógvi Jacobsen óvanliga góða máltevið, sum hann hevur. Tað gjørdist tó ikki meira enn nær við og næstan hjá Rógva, sum móti dystarenda hevði størsta føroyska møguleikan. Ein møguleiki, sum tó varð sendir í krovið á litaviska málverjanum.

Við dystarskránni hjá føroyska landsliðnum í hugaumfamt Litava eru dystir móti Fraklandi, Ukraina og Italia - so er útidysturin móti Litava helst besti møguleikin fyri stigum í ár. Og tó at Andrew og Rógvi ikki vilja lova nakað, so tykist eitt ávíst bjartskygni at búgva í spælarunum.

- Vit trúgva avgjørt upp á eitt gott úrslit móti Litava. Her í Føroyum høvdu vit eitt hampuligt tak á teimum, og bæði í styrki og skjótleiki vóru vit á leið eins sterkir, sum teir. Landsliðshópurin er eisini sterkai nú, enn hann var í 2006. Vit hava spælt meira stabilt, og tað ger eisini, at vit tora betri at spæla, heldur Rógvi Jacobsen.

Og Andrew av Fløtum var ikki ósamdur, tá hann á tíðindafundinum varð spurdur, hvørt vit nú skulu hava stigið, sum kann lyfta okkum eitt sindur á FIFA-styrkislistanum.

- Eg haldi ikki, at støðan á FIFA-listanum er nakað, sum vit hugsa so nógv um. Heldur er tað so, at vit fleiri ferðir hava verið heilt nær við, so fyrr ella seinni fáa vit eitt ella fleiri stig, heldur Andrew.



*Somikið nær við var Rógvi Jacobsen, tá Føroyar tann 10. oktober í 2002 taptu 2-0 fyri Litava*
*Savnsmynd/álvur*

# Knørrur helt stevnu í Danmark

**Kappróðrarfelagið Knørrur í Hvidovre skipaði fyri kappróðrarstevnuni Knørrur Regatta 2007 í Sydhavn leygardagin 25. August**

REGATTA
*Tíðindaskriv*

Hetta var fyrstu ferð at kappróðrarfelagið Knørrur royndi seg sum fyriskipara av stevnu, og hóast nógvan vind og harðan streym í Kalvebodsløbet,gekk væl at avgreiða teir sjey róðrarnar. Umframt tann góða og spennandi róðurin kundu áskoðarnir gleðast um, at tað ikki dryppaði frá teimum gráu skýggjunum, ið sóu tung og hóttandi út tað mesta av degnum.

Hetta var triðja stevnan í kappingini um at gerðast endaligur Danmarksmeistari í føroyskum kappróðri fyri útisetar. Fyrsta stevnan var í Nordhavn 26. mai, tann næsta var í Ishøj 9. juni. Seinasta stevnan hetta kappingarárið verður í Sorø 8. september. 20. oktober verður stór veitsla fyri rógvarar og onnur við áhuga fyri rógving í Føroyahúsinum.

**Úrslitini og stigabýti aftaná Knørrur Regatta 2007:**

| **6 mannafør menn** | **tíð** |
|---|---|
| 1 Brundurin | 5.43,10 |
| 2 Skarvur | 5.43,11 |
| 3 Neystið | 5.44,92 |
| 4 Knørrur | 5.50,51 |

| **DM-Støða** | **stig** |
|---|---|
| 1 Brundurin | 9 |
| 2 Skarvur | 8 |
| 3 Neystid | 7 |
| 4 Knørrur | 6 |
| 5 Skæling | 1 |

| **6-mannafør gentur** | **tíð** |
|---|---|
| 1 Neystið | 6.24,48 |
| 2 Knørrur | 6.31,28 |

| **DM-Støða** | **stig** |
|---|---|
| 1 Neystið | 11 |
| 2 Knørrur | 10 |

| **6-mannafør, kvinnur** | **tíð** |
|---|---|
| 1 Knørrur | 6.41,08 |
| 2 Neystið | 7.01,73 |

| **DM-Støða** | **stig** |
|---|---|
| 1 Knørrur | 12 |
| 2 Neystið | 9 |
| 3 Sóljan | 2 |

| **6-mannafør dreingir** | **tíð** |
|---|---|
| 1 Brundurin | 5.41,84 |
| 2 Knørrur | 6.04,04 |
| 3 Vesturskinið | 6.10,86 |

| **DM-Støða** | **stig** |
|---|---|
| 1 Knørrur | 9 |
| 2 Brundurin | 7 |
| 3 Vesturskinið | 5 |
| 4 Sverige 1 | 4 |
| 5 Skarvur | 2 |

| **6-mannafør, nordisk** | **tíð** |
|---|---|
| 1 Føroyar | 5.54,52 |
| 2 Danmark | 6.19,34 |

| **DM-Støða** | **stig** |
|---|---|
| 1 Føroyar | 8 |
| 2 Danmark | 6 |
| 3 Sverige | 2 |
| 4 Grønland | 1 |
| 5 Ísland | 0 |

| **10-mannafør, menn** | **tíð** |
|---|---|
| 1 Tvøråbáturin | 5.18,88 |
| 2 Vágbingur | 5.44,74 |

| **DM-Støða** | **stig** |
|---|---|
| 1 Tvøråbáturin | 12 |
| 2 Vágbingur | 8 |
| 3 Havnarbáturin | 3 |

| **10-mannafør, veteranar** | **tíð** |
|---|---|
| 1 Tvøråbáturin | |

| **DM-Støða** | **stig** |
|---|---|
| 1 Tvøråbáturin | 12 |
| 2 Vágbingur | 5 |
| 3 Havnarbáturin | 3 |

# Formula-liðið

*Sosialurin mannar Formula-liðið við teimum spælarum, sum stóðu seg best í 20. umfarinum av Formula-deildini*

